Hin reini gandur ella tað reina tvætl?

# Hví dámar so nógvum Harry Potter?

**Tað er ikki ofta, at fólk standa á rað og bíða eftir at ein ensk barna- og ungdómsbók kemur út. Sjálvt um klokkan er farin av midnátt, so standa Harry Potterfjepparar, onkur í svørtum kappum og brillum, og bíða tolin eftir at kunna keypa nýggjastu bókina**

**BESTSELJARI**
*Kim Simonsen*



*J. K. Rowlings var als ikki kend, áðrenn hon fór undir at skriva Harry Potter bøkurnar. Nú sigst hon vera næstríkasta kvinnan í Onglandi - ikki langt aftan fyri Elisabeth drotning*

Tað er heldur ikki ofta, at ein bók hevur eitt fyrsta upplag uppá 120.000 eintøk í Danmark. Eingin bók er so nógv týdd, sum Harry Potter, bert Bíblian yvirhálar hesar bøkurnar hjá J. K. Rowlings.

Tað er ein gáta fyri bókmentafrøðingar, hvussu hendan enska kvinnan hevur funnið gylta lykilin inn í hugaheimin hjá børnum og ungum kring allan heimin, í eini tíð har telduspølini, DVD, fartelefonir og alt annað tykist vera meiri spennandi enn stórar tungar og tjúkkar bøkur um ein lítlan og nørdutan drong, ið er ein gandakallur.

Eg haldi, at hetta er okkurt sum øll, ið eru góð við bøkur skulu gleða seg um, at ung fáa só stórar upplivingar við bókum, ti byrja tey at lesa t. d. Harry Potter, so er ein góður kjansur fyri at tey lesa annað seinni.

## Dugir J.K. Rawling at ganda?

Høvundin J. K. Rawling er ein altjóða celebrity í dag. Men so var ikki áðrenn hon fór at skriva um Harry Potter. Hon var tá ein fráskild einlig mamma við tveimum børnum. Hon fekk hugskotið, meðan hon sat í einum toki. Við eitt sá hon Harry Potter fyri sær, men hon hevði hvørki pappír ella ein blýant við sær, hetta segði hon herfyri í einum temakvøldi á DR2 um hana og hennara bøkur. Tá hon kom heim, fór hon at skriva, og hon hevur skrivað síðani. Í dag sigst, at hon er næstríkasta kvinnan í Onglandi, ikki langt aftan fyri Drotning Elisabeth.

Tá røðin av bókum enda við gandatalinum sjey, sigur hon seg vilja fara í holt við okkurt annað. Orsøkin til at tað eru sjey bøkur er, at hvør bók snýr seg um eitt skúlaár í gandaskúlanum Hogwarts.

Hogwarts er ein skúli fyri »Witchcraft and Wizardry«. Hann er hin besti skúlin í heiminum, ið sigst liggja í Onglandi. Skúlin er túsund ára gamal og er stovnaður av fýra av teim mest kendu gandakallunum tá, ið vóru Godric Gryffindor, Helga Hufflepuff, Rowena Ravenclaw and Salazar Slytherin.

## Hogwarts ein mynd av enska samfelaginum

Hesin skúlin er upp á allar mátar ein góð mynd av enska stættarsamfelaginum. Hogwarts er nærum ein keipumynd av eliteru privatskúlunum í Onglandi. Tey fínu og fremstu eru fødd sum gandakallar, meðan tey, sum hava vanlig foreldur eru ikki eins fín. Hesi kalla tey fyri »runublóð«, t. v. s., at tey eru skitin og óektaðir arvingar til skúlan. Ikki øll vilja hava hesi »vanligu« gandakallarnar gangandi á fína skúlanum. Hetta er jú eitt ótrúliga veruligt stríð og er til staðar innan enskar privatskúlar og allan vegin til lærdar háskúlar sum Oxford og Cambrigde, ið altíð hava verið skúlanir hjá ensku yvirstættini.

Seinasti filmurin »Harry Potter og Flammernes Pokal« er partvíst gjørdur í Oxford. Á ein hátt er okkurt serligt enskt í søguni um Harry Potter. Har er ein serligur andi av søgu, mytu og av elituhugsan eisini.

Stættarstríðið er nærverandi, og Potter, ið sjálvur er aðalborin innan hesa verðina hevur tvey vinfólk, ið bæði eru »vanlig«. Yvirstættarfelagið, ella kollegiie Slytherin, hava lyndi at spæla við merktum kortum, teir vilja altíð snýta. Hesi eru rík, tey hava arvað bæði fínar titlar, nøvn og gandamátt. Soleiðis eru lærdir háskúlar sum Oxford og Cambridge eisini, har eru ymisk colleges, ið hava sera ymiskar samleikar. Eins og í Harry Potter, so ganga tey í svørtum kappa. Soleiðis snýr hetta seg um ein bardaga um vald, ágóðar og rættin til at stjórna gandakallafakinum framyvir. Í felagnum fyri tey fínu, Slytherin, eru næmingarnir sjálvskrivaðir og føddir inn í felagið. Serliga hata tey frá Slytherin felagið Gryffindor. Hetta felagið hevur mest vanlig børn, hvørs foreldur ikki eru fínar gamlar gandakallafamiljur. Gryffindor eru tí eitt undirmett felag, og høvdu ongantíð vunnið á teim ríku snobbunum, men tey hava Harry Potter sum »málmann« í spælinum »quidditch«. Hogwarts rúmar soleiðis sum allar mytur bæði tað góða og ónda. Harry Potter er sjálvur mangan í iva, um hann er ein partur av tí ónda ella góða.



*Harry Potter minnir okkum um søguna, um gandin og um mytuna - har tað vanliga lívið vantar...*

## Ein heimur fyri seg

Rawlings dugir at savna upp á løg í søguni hjá okkum. Har eru mystikkur frá miðøldini, gresk-, rómversk- og norrøn mytolog blandað saman við ymiskum, ið hon sjálv hevur uppfunnið. Serliga hugtakandi eru ævintýrdjór av øllum slag.

Tað er torført ikki at gerast bergtikin av øllum nøvnunum í bókunum, tí hvat er ein Auror, hvat er Avada Kedavra, Bane, Death Eaters, Hedwig, Petrificus Totalus, Platform nine and three-quarters, Quidditch og Sectumsempra? Alt hetta er Harry Potter kotumál. Av og á havi eg hugsað, at Rawlings hevur brúkt mytologisk leksikon, latinskar orðabøkur, bøkur um gandadjór, alkymi og druidar, ið hon hevur kopiera, og sjálvandi eisini brúkt egið hugflog.

## Ov nógvur gandur?

Fyri nøkrum árum síðani skuldsettu kristin Harry Potter røðina fyri at snúgva seg ov nógv um gandakellingar, gand og óguðiligan devulskap. Hetta er ein serlig lesing av »fantasygenruni«, ið eg havi ringt við at taka í fullum álvara. So skuldi man fordømt Ringana Harra, ævintýrum, kvæðum, Star Wars og nógvum øðrum.

Tað eru ikki bert konservativ kristin, ið hava fordómar móti Harry Potter bókunum. Kendi enski høvundin A. S. Byatt, hevur skrivað eina atfinningarsama grein um hesar bøkur, ið hon kallar: »Harry Potter And The Childish Adult«. Her sigur hon, at Harry Potter bøkurnar eru mest fyri tey, hvørs hugaheimur er álopin av teknifilmum, vánaligum sápuundirhaldsrøðum í sjónvarpinum, reality sjónvarpi og av slatri um kend. Hon saknar, at gandurin ikki er meiri vandadamikil, enn hann er í Harry Potter.

Eg skilji hesar innvendingar, men eri kanska ikki heilt samdur. Sum øll modernaði ævintýr, so er ein syrgilig søga í miðuni á søguni um Harry Potter. Foreldrini hjá honum eru dripin av einum óndum gandakalli kallaður Voldemort. Hetta ger hann til ein bæði tragiskan og spennandi persón. Sum í søguni Star Wars, so er hin góði Anakin drigin at myrku síðuni. Myrka valdið, t. d. hevndarhugurin hevur tak á Harry Potter eisini. Hann dugir at tosa við slangur, ið bert Voldemort og »myrki« gandakallurin Salazar Slytherin dugdu áðrenn hann. Tað snýr seg um at halda hjartað reint og at velja rætt, og júst hetta er ofta temaði í Harry Potter bókunum.

## Tragiska brilluapan

Fólkini, ið hava ættleitt hann eru órein við hann. Lítla foreldraleysa brilluapan Harry er illanni royndur av vanligu verðini hjá »mugglarum«, ið hesi fólk við gandakynstri kalla øll vanlig fólk. Familjan Dursley eru nøkur smáborgarlig beist, ið enda við at læsa Harry inni, so hann ikki sleppur aftur til Hogwarts.

Sum allar veruliga góðar barnasøgur og øll sonn ævintýr, er okkurt skerandi vakurt við børnum, við serligum evnum, eru so órættvíst skerd í lívinum. Men henda pínan er mangan ein serliga sterk megi, ið vit síggja hjá dunnuunganum hjá H. C. Andersen og hjá Øsku Fíu. Sum øll happað, hartað og illa hagreidd klók børn, so liva tey í einari paralellari verð, ið er full av gandi.

Børn eru lívsjáttandi, og velja altíð ein veg. Lítla menniskja er sum trøðini, ið tráa eftir ljósinum. Tað ljósið, ella tráanin eftir ljósinum, ið boyggir tey og gevur teim skap og samleika. Hetta ljós, ella rættari sakt, hendan gandin finna vanlig børn mangan í hesum at lesa bøkur, og í hesum tíðum kanska serliga Harry Potter bøkur.

## Gandurin í lívinum

Harry Potter minnir okkum um søguna, um gandin og um mytuna, alt vanliga lívið mangan vantar. Tað er ikki pláss fyri alfum, trøllum, nissum, fabildjórum og hugflogið endar mangan við skerdan lut í samfelaginum í dag. Men dreymar, ævintýr eru júst ein partur av »veruleikanum«, eins og vit eru fátøk um vit ongantíð hava hoyrt um fuglin Fønix, ið brennur í grund, og reisur seg úr øskuni. Hesin tragiski og vakri fuglurin er í Harry Potter ein hjartagóður hjálpari, hvørs tár eru lekjandi, men bert um hjarta er reint.

Søgurnar um Harry Potter snúgva seg um stór tema, sum vinalag, trúfesti, samanhald, vilja og hetta at velja her í lívinum. Tað eru ikki okkara evni, ið siga hvørji vit eru, men tað vit velja í lívinum.

Keldur:
A.S. Byatt: »Harry Potter And The Childish Adult«.
DR2